UTTAN ÚR HEIMI

# Neyvan nøkur broyting í oljuprisinum



*Saudiarabiski oljumálaráðharrin, Ali al-Naimi, er ein týðandi maður. Tað sást eisini, tá hann kom til Iran í gjár*

**Í morgin hittast OPEC-londini at umrøða støðun á oljumarknaðinum. Saudiarabia er fyri at økja framleiðsluna fyri at tálma príshækkingini, men í veruleikanum hevur tað ongan týdning.**

OLJUPRÍSUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Oljuprísurin kom aftur í hæddina beint undan fundinum hjá OPEC-londunum í morgin. Í USA var prísurin uppi á 54 dollarum fyri tunnuna fyrradagin, og norðsjóvarolja, sum skal latast keyparunum í apríl, fór fyri 52,8 dollarar.

Undan OPEC-fundinum hava eygleiðarar sagt, at oljuútflyraralondini fara neyvan at økja framleiðsluna hjá teimum einstøku limalondunum, og tí kom tað rættiliga óvart á tey flestu, tá saudiarabiski oljumálaráðharrin, Ali al-Naimi, mánadagin segði, at hann fer at mæla til at økja framleiðsluna 500.000 tunnur um dagin.

Sambært Reuter eru fleiri OPEC-lond ørkymlað av, at tann høgi oljuprísurin samsvarar ikki við ta veruligu støðuna á marknaðinum. Tað er nóg mikið av olju á marknaðinum í løtuni, men størri eftirspurningur seinni í ár fer at krevja, at uppaftur meiri olja kemur á marknaðin.

At Saudiarabia hevur mælt til at økja framleiðsluna 500.000 tunnur um dagin merkir ikki, at meiri olja kemur á altjóða marknaðin, sigur Arnstein Wigestrand hjá Enskilda Securites við Aftenposten. Hann vísir á, at OPEC-londini framleiða sum er meiri enn tær kvotur, sum tey hava fingið, og tí er hækkingin meiri ein staðfesting av veruleikanum og fær tí neyvan nakra ávirkan á prísin, sigur hann.

# Fleiri ákærur um krígsbrotsverk

**Krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia krevur nú fleiri leiðarar sendar til Haag**

KRÍGSBROTSVERK
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Fyrradagin møtti fyrrverandi albanski forsætisráðharrin Ramush Haradinaj í Haag, tí krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia hevur ákært hann fyri krígsbrotsverk undir krígnum í Kosovo í 1998 og 1999. Hann er ákærdur fyri ikki færri enn 37 lógarbrot, men noktar seg sekan í øllum.

Ramush Haradinaj er ikki tann einasti politiski leiðarin á Balkan, sum hevur fingið boð um at koma til Haag. Í gjár upplýsti uttanríkisráðið í Makedonia, at dómstólurin hevur sent boð eftir fyrrverandi innanríkisráðharranum Ljube Boskovski. Hann er ákærdur fyri at hava verið havt ábyrgdina, tá makedonskir hermenn skutu tíggju albanar í høvuðsstaðnum Skopje í 2001, og dómstólurin vil eisini vera við, at hann gav herinum boð um at skjóta seks pakistanar og ein indara eitt ár seinni. Tá vildu myndugleikarnir vera við, at teir sjey menninir ætlaðu at søkja at amrikonsku sendistovuni í Skopje, men dómstólurin í Haag sigur, at hetta var bara ein umbering, og at talan í veruleikanum var um rasistiskan ágang.

Krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia hevur eisini kravt at fáa aðrar fyrrverandi leiðarar útflýggjaðar, og ES hevur boðað frá, at londini á Balkan sleppa ikki at tosa við samveldið um limaskap, fyrr enn allir brotsmenn eru útflýggjaðir.

## Rýma frá Persson

Fyri aðru ferð í átta hevur ein svensk veljarakanning víst, at tann sosialdemokratiski stjórnarflokkurin hevur mist rættiliga nógv av sínari undirtøku.

Tann seinna kanningin er frá stovninum Sifo, og hon vísir, at sosialdemokratarnir høvdu fingið 33 prosent av atkvøðunum, var ríkisdagsval nú. Tað merkir, at undirtøkan er minkað fimm prosentstig eftir einum mánað, skrivar Svenska Dagbladet. Verða atkvøðurnar hjá teimum báðum stuðulsflokkunum hjá stjórnini lagdar afturat, høvdu teir tríggir flokkarnir fingið 46,2 prosent, var val nú. Harafturímóti høvdu teir borgarligu andstøðuflokkarnir fingið 51,2 prosent.

Sifo ivast ikki í, at sosialdemokratarnir hava mist nógvar veljarar, eftir at Gøran Persson, forsætisráðharri, herfyri segði, at tað verður neyðugt at hækka skattin fyri at varðveita vælferðarsamfelagið. Tað fekk fleiri sosialdemokratar at venda sær ímóti forsætisráðharranum. Ein onnur orsøk til ta minkaðu undirtøkuna er sambært Sifo tað støðuga arbeiðsloysið, og at nógvir sviar eru misnøgdir við, hvussu stjórnin handfór flóðalduvanlukkuna í Asia, sum kostaði nógvum svium lívið.

## Óheppin stavivilla

Herfyri almannakunngjørdi ein heimasíða hjá amerikonsku kongressini nakrar frágreiðingar um amerikanskar kjarnorkuroyndarspreingingar í árunum frá 1962 til 1970. Har stóð millum annað, at amerikanararnir høvdu sprongt kjarnorkubumbur í Sudan.

Tað kom púra óvart sudansku stjórnina, ið sum vera man vildi hava at vita, hvat hetta var fyri nakað, sigur BBC. Men eftir einari løtu kundi Mustafa Osman Ismail, uttanríkisráðharri, sissa sínar landsmenn, tí tað vísti seg, at ein stavivilla hevði sníkt seg inn í amerikonsku frágreiðingina. Amerikanararnir høvdu ikki sprongt kjarnorkubumbur í Sudan, men í Sedan, sum er eitt royndarøki hjá amerikonsku verjuni í statinum Nevada.

Amerikanska sendistovan í Khartoum hevur nú váttað fyri sudansku stjórnini, at USA hevur ongantíð sprongt kjarnoprkubumbur í Sudan, sigur BBC.

## Posthúsið opið aftur

Fyri trimum árum síðani bleiv høvuðsposthúsið í New Jersey í USA latið aftur, eftir at posthúsið hevði fingið fleiri brøv við miltbrandbakterium.

Nú er posthúsið aftur opið. Tað hendi mánadagin, og myndugleikarnir og postverksleiðslan høvdu valt at gera nógv burturúr, skrivar Reuter. Endamálið var at vísa, at amerikanska fólkið letur seg ikki kúga av yvirgangsmonnum og miltbrandbakterium. Nú posthúsið er opið aftur, er alt innbúgvið og allar maskinurnar nýggjar.

Fýra fólk doyðu av miltbrandbakteriunum á heysti í 2001, og 17 onnur vórðu smittað. Millum teirra, sum fingu brøv við miltbrandbakterium, vóru tveir senatorar.

## Hitler royndi kjarnorku

Í einari nýggjari bók vil rithøvundurin Rainer Karich vera við, at týskararnir royndu eina kjarnorkubumbu, stutt áðrenn seinni heimsbardagi endaði.

Í bókini »Hitlers Bomb« skrivar Karich, at týskararnir gjørdu fleiri royndir við smáum kjarnorkubumbum har suðuri í Týsklandi á vári í 1945. Hann hevur millum annað funnið sovjettisk skjøl, sum vísa, at týskararnir gjørdu eina tílíka royndarspreinging á royndarstøðini Ohrdruf tann 3. mars í 1945. Royndin bleiv gjørd í einari týningarlegu, og sambært skjølunum doyðu fleiri hundrað fangar av spreingingini.

Sambært Rainer Karich vóru tær týsku kjarnorkubumburnar nóg minni enn tær báðar, sum amerikanararnir sleptu niður yvir Hiroshima og Nagasaki nakrar mánaðir seinni. At týskararnir ikki gjørdu eina størri kjarnorkubumbu komst sambært høvundinum av, at teir høvdu ikki nóg mikið av ríkaðum urani.